**KRABBAMEINSFELAGIÐ**

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
FO-110 Tórshavn

Telefon: 31 79 59
www.krabbamein.fo
T-post: kmf@krabbamein.fo

krabbameinsfelagið

# Foreldrabólkurin

Ein bólkur fyri foreldur, hvørs barn hevur ella hevur havt krabbamein, og foreldur, ið hava mist barn av krabbameini.



Krabbameinsfelagið
*Umsorgan fyri tær*

1. februar 2019



## SAMAN VIÐ ØÐRUM

At hava mist ella at eiga eitt barn við krabbameini, er ofta merkt av sorg, stúran og stórum máttloysi.

Hóast stúranin, sorgin og máttloysið kunnu upplivast ymiskt, so kann tað, at vera saman við øðrum í somu støðu, geva kensluna av felagsskapi, sum kann sissa, kveikja vón og styrkja foreldrini í sváru støðuni.



## UM BÓLKIN

Foreldrabólkurin er ein sjálvhjálparbólkur hjá Krabbameinsfelagnum. Endamálið er at stuðla og ráðgeva foreldrum, hvørs barn hevur ella hevur havt krabbamein, og foreldrum, ið hava mist barn av krabbameini.

Bólkurin leggur dent á hugna, nærveru og  at vera saman við øðrum, sum eiga eitt barn við krabbameini, ella hava mist eitt barn, og sum kenna til ta sorg og tað máttloysi, tað ber í sær.

Formaðurin í bólkinum tekur stig til fundir og hugnaløtur. Limirnir í bólkinum fáa innbjóðing við telduposti ella sms.

**Tað er ókeypis at vera limur í bólkinum.**

Hevur tú hug at gerast limur í bólkinum, ella hevur tú spurningar viðvíkjandi tilboðunum hjá Krabbameins-felagnum, kanst tú seta teg í samband við okkum við at ringja 317959 senda teldubræv til kmf@krabbamein.fo